**Heimarøktin og Serforsorgin**
*Meginskrivstovan*

# Leiðari til Forsorgardeildina fyri sinnisveik

**Eitt starv sum leiðari á Forsorgardeildini fyri Sinnisveik, skipað undir Heimarøktini og Serforsorgini, verður hervið lýst leyst til setan 1. juni 2002 ella eftir avtalu.**

**Forsorgardeildin fyri Sinnisveik er nýggj deild, sum fær til uppgávu at fyrisita tilboð til sinnisveik og onnur við líknandi trupulleikum. Í fyrstani verður uppgávan at samskipa verandi tilboð og seta í verk nýggj bústaðar- og virknistilboð fyri málbólkin.**

**Deildin líkist tí, sum aðrastaðni verður nevnt "Socialpsykiatri", og uppgávurnar eru m.a. at geva tilboð til viðskiftafólk og samstarva við sjúkrahúspsykiatriina, økispsykiatriina, almannaverkið og aðrar viðkomandi skipanir.**

Talan er um nýtt starv, sum tann, ið settur verður, skal byggja upp saman við leiðslu og starvsfólkum á økinum.

Leiðarin hevur dagligu fyrisitingarligu-, fíggjarligu- og fakligu heildarleiðsluna av deildini og skal saman við leiðsluni í Heimarøktini og Serforsorgini hava ábyrgdina av:

- at byggja upp og samskipa virksemið á fyrisitingar-deildini fyri sinnisveik
- at menna ta fyrisitingarligu leiðsluna
- at veita starvsfólkunum fakliga ráðgeving
- at reka mennandi starvsfólkapolitikk
- at seta í starv og siga starvsfólkum úr starvi eftir nærri ásettum reglum
- at tryggja gott samstarv innanhýsis og við aðrar stovnar og skipanir
- at tryggja støðuga fakliga menning
- at hava eftirlit við, at játtaða fíggjarætlanin verður hildin
- at fyriskipa fíggjarlógararbeiðið fyri virksemið hjá deildini
- at fyrireika og fyriskipa viðari útbygging av virkseminum á økinum fyri sinnisveik
- at menna samstarv við aðrar fakbólkar, myndugleikar og áhugabólkar
- at samstarva við áhugabólkar, sum arbeiða fyri rættindum hjá sinnisveikum

**Førleikakrøv**

Væntað verður, at umsøkjarin hevur viðkomandi fakliga útbúgving og royndir í arbeiði við sinnisveikum. Hevur hug og hegni at arbeiða sjálvstøðugt og dugir at seta fyriskipanir í verk. Fyrimunur er, um umsøkjarin hevur leiðslu- og fyrisitingarligar royndir frá líknandi arbeiði.

**Setanar- og lønarviðurskifti**

Talan er um starv við setanarstað í Heimarøktini og Serforsorgini við ábyrgd mótvegis stjóranum.
Løn sambært sáttmála ímillum Fíggjarmálastýrið og viðkomandi yrkisfelag.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Jákup Foldbo tlf. 304020

**Umsóknir:**

Skrivlig umsókn, við avriti av prógvum, viðmælum v.m. skulu sendast til:

**Heimarøktina og Serforsorgina**
Att. Jákup Foldbo, stjóri
Eirargarður 2, 2. hædd
FO-100 Tórshavn.

**Umsóknarfreist: 12. apríl 2002, kl. 12:00**

# Tiltøk í apríl 2002

***Fotoframsýningin hjá Klaus Kiesewetter við myndum frá Antarktis er í húsinum til og við sunnudagin 7. apríl og framsýningin 'Vill Djór í Norðurlondum"er í húsinum til og við fríggjadagin 12. apríl.***

**Mánadagur 1.**
2. Páskadagur. ***Húsið er stongt***

**Týsdagur 2. kl. 19.30**
KLIPP, Filmsfelag Norðurlandahúsins sýnir danska filmin »The King is Alive« frá 2000. Leikstjóri er Kristian Levring. Filmurin snýr seg um ein vesturlendskan ferðamannabólk, sum vegna bensintort steðgar upp mitt inni í oyðimørkini í Namibia. Filmurin vísir, hvat neyðugt er, tá fólk skulu yvirliva.

**Fríggjadagur 5. kl. 19.30**
Konsert við Brandur Enni og Pætur við Keldu.

**Leygardagur 6. kl. 10.00**
Grindamannafelagið heldur fund.

**Leygardagur 6. kl. 19.30**
Musikskúlakonsert. Fyriskipari er Musikskúlaskipanin.

**Mikudagur 10. kl. 19.30**
ORFEUS. Tónlistarfelag Norðurlandahúsins hevur konsert. Sámal Petersen (FO), fiólleikari og Steinunn Birna Ragnarssdóttir (ÍS), klaverleikari fara at spæla verk eftir Beethoven, Wieniawski og Franck.

**Hósdagur 11. kl. 19.30**
ORFEUS. Tónlistarfelag Norðurlandahúsins hevur konsert í Býráðshøllini í **Runavík**. Sámal Petersen (FO), fiólleikari og Steinunn Birna Ragnarssdóttir (ÍS), klaverleikari fara at spæla verk eftir Beethoven, Wieniawski og Franck.

**Hósdagur 11. kl. 19.30**
Føroyskt mentanarkvøld. Á skránni verður tónleikur, sjónleikur, kórsangur, yrkingar og føroyskur dansur. Fyriskiparar eru: Vár Berghamar Jacobsen og Páll Danielsen

**Leygardagur 13. kl. 13.00**
Barna- og Ungdómstalvkapping. Fyriskipari er Talvsamband Føroya.

**Fríggjadagur 19. kl. 9.00**
KT-messa. Fyriskipari er Virkisráðgeving.

**Leygardagur 20. kl. 9.00**
KT-messa. Fyriskipari er Virkisráðgeving – opið er fyri almenninginum.

**Mikudagur 24. kl. 19.30**
Fyrilestur undir heitinum »Laxness og Garpatáttur«. Martin Næs og Tóra Tóroddsdóttir greiða frá um bókina »Gerplu« hjá Laxness, sum tey bæði hava umsett til føroyskt. Fyriskipari er Norrøna Felagið.

**Hósdagur 25. kl. 14.00 – 18.00**
Flaggdagur. Húsið er opið.

**Fríggjadagur 26. kl. 14.00 – 18.00**
Dýribiðidagur. Húsið er opið.

**Fríggjadagur 26. kl. 19.30**
Kvøldseta í samband við Hornorkesturstevnuna.

**Leygardagur 27. kl. 15.00**
Konsert í samband við Hornorkesturstevnuna.

**Sunnudagur 28. kl. 19.30**
Almennur politiskur fundur í samband við Løgtingsvalið. Fundurin verður sendur í Útvarpi Føroya og Sjónvarpi Føroya.

***Broytingar í skránni kunnu koma fyri.***
***Húsið er opið gerandisdagar kl. 10.00 -18.00 og sunnudagar kl. 14.00-18.00.***
***Í kaffistovuni er høvi at keypa te, kaffi, sodavatn, øl, breyð, køkur o.a.***

**NORÐURLANDAHÚSIÐ Í FØROYUM**
Telefon nr. 317900. Telefax nr. 319790
e-mail:nlh@nlh.fo · http://www.nlh.fo
Tekstvarp í SvF frá síðu 650


# Reingerðarfólk til Miklagarð

**Miklagarður í SMS søknast eftir reingerðarfólki at byrja skjótast tilber.**

Løn eftir nærri avtalu.

Er hetta nakað fyri teg, so ring til Miklagarð og spyr eftir Johnny Priess.

**MIKLAGARÐUR**
SMS • Postboks 1069 • 110 Tórshavn
Tel 31 30 11



AUTO
-Dag & nátt-
-Alt døgnið-
Hýra bil - ring 311234
BENZIN
DIESEL
KIOSK

AUTO
311234



Sosialurin
Lesið Sosialin – tað loysir seg




FØROYA KOMMUNUFELAG

# Starvsfólk

Starv hjá Føroya Kommunufelag er leyst at søkja til setan 1. juni 2002 ella skjótast gjørligt.

**Uppgávur**
Starvið bjóðar uppá spennandi og fakliga bæði mennandi og krevjandi uppgávur. Nærri upplýsingar um virkisøkið hjá felagnum eru at finna á heimasíðuni www.fkf.fo.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava útbúgving frá hægri lærustovni, t.d. løgfrøðiliga ella samfelagsliga útbúgving, ella aðra útbúgving og royndir, sum kunnu sammetast við hesar. Serligur dentur verður lagdur á kunnleika til kommunal viðskifti. Neyðugt er við hollum kunnleika til telduarbeiði, føroyskt, danskt og enskt.

**Setanarviðurskifti**
Roknast má við, at tað til tíðir verður neyðugt at arbeiða uttanfyri vanliga arbeiðstíð.
Starvsfólkið hevur beinleiðis tilvísing til stýrið hjá felagnum.
Løn samb. avtalu.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Sveiney Sverrisdóttir skrivara á tel. 447600 ella teldupost: kontakt@fkf.fo.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum, CV og viðmælum verða at senda til:

**Føroya Kommunufelag**
P. O. Box 73
600 Saltangará

og verða Føroya Kommunufelag í hendi í seinasta lagi týsdagin 16. apríl 2002.

*Føroya Kommunufelag er landsfelagið hjá føroysku kommununum. Skrivstovan veitir leiðbeining og upplýsing til kommunurnar, ger uppsøkjandi arbeiði viðvíkjandi fyrireiking av málum fyri stýrið og skipar fyri fundum og skeiðum fyri limakommununar.*

Starv

# Skrivstovufólk

Ein av stóru avbjóðingunum hjá Strandfaraskipum Landsins er at hækka tænastu- og góðskustøðið innan fólkaflutningin. Í hesum sambandi verður søkt eftir skrivstovufólki (M/K) til fólkaflutningsdeildina – Oyggjaleiðir og Bygdaleiðir.

Tað er ynskiligt, at tann, sum settur verður kann byrja skjótast gjørligt.

**Uppgávurnar hjá fólkaflutningsdeildini**
Fólkaflutningsdeildin skal veita eina úrslitagóða fyrisiting innan fólkaflutningstænastu, herundir samskipa, viðlíkahalda og menna stýringina innan fólka- og akfarsflutningin hjá fyritøkuni.

Virksemið á deildini fevnir um hesar høvuðsfunktiónir:
- Planlegging
- Rakstur (skip og bussar)
- Ferðslusamskipan
- Ferðaseðlasamskipan

**Uppgávur hjá tí, ið sett/ur verður**
Uppgávur hjá skrivstovufólkinum verða m.a. at taka sær av:
- Avrokningum til privatu arbeiðstakararnar
- Elektronisku skúlakortunum
- At avlesa modulir til Buscom-skipanina
- Skaðafrágreiðinum v.m.
- Fyrifallandi uppgávum á skrivstovuni
- Vanligari kundavgreiðslu

**Førleikakrøv**
- Góðan tænastuhugburð
- Góðan edv-kunnleika
- Málrættaður
- Góðan røkjuskap
- Góð samstarvsevni
- Fyrimunur er um tann, ið settur verður hevur royndir og kunnleika innan bókhaldsskipanina Navision
- Góð evni at orða seg bæði skrivliga og munnliga á føroyskum.

**Setanartreytir**
Talan er um eitt starv við spennandi avbjóðingum. Starvið gevur góðar møguleikar fyri persónligari og fakligari menning.
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarandi fakfelag.

**Umsóknir**
Umsókn við prógvskjølum skal sendast til:

***Strandfaraskip Landsins***
att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn

og skal vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 15. apríl 2002.

Um tú ynskir nærri upplýsingar, kanst tú seta teg í samband við Guðrið Ellefsen, á tlf. 34 30 00 ella á e-post: gue@ssl.fo.

STRANDFARASKIP LANDSINS

*Strandfaraskip Landsins er ein landsfyritøka undir Vinnumálastýrinum / Samskiftisdeildini.*

*Høvuðsuppgávan hjá fyritøkuni er at lúka landsins tørv á innanlanda fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika.*

*Árliga rakstrarætlanin hjá Strandfaraskipum Landsins javnvigar við yvir 150 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, herav umleið 155 operatørar. Talið á flutningsanleggum er 11 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutningsuppgávurnar fevna um alt landið.*

**Heimarøktin í Norðoyggjum**

# Summarfrítíðar-avloysarar

**Sjúkrasystrar**
**Heilsurøktarar og heilsuhjálparar**

Søkt verður eftir summarferiuavloysarum í skiftandi vaktum í Heimarøktini í tíðarskeiðnum 1. juni – 30 septembur.

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til økisskrivstovuna – tlf. 457243.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvi verður at senda til:

**Heimarøktin**
Bøgøta 34
700 Klaksvík

# Skrivstovuhøli til leigu

Skrivstovuhøli til leigu, uml. 100 m2 til støðdar, í húsinum hjá Føroya Postfelag á Tinghúsvegi 15.

Nærri fæst at vita um hølini á tlf. 317231 ella 217231.

demich

Stiðjagøta 2 – Postboks 378
FO-110 Tórshavn
Tlf.: 311071 – fax: 310460
e-mail: demich@demich.fo

# Lærlingur

**Hevur tú hug at royna teg?**

Vegna økjandi virksemið, søkja vit eftir lærlingi til handil okkara, læran kemur at umfata samskifti við viðskiftafólk, útkoyring og bílegging av vørum o.a.

Væntað verður at tú dugir at arbeiða sjálvstøðugt, er fyrikomandi og hevur hug at veita viðskiftafólki okkara eina góða tænastu.

Fyri at koma í læru, er tað ein treyt, at tú hevur koyrikort og FHS ella HH.

Skrivlig umsókn verður at senda til okkum í seinasta lagi 12. apríl 2002.


SLANGUVOGNAR
við t.d. 60 m 1" slangu

· Brandslangur
· Eldsløkkjarar
· Brandteppir

Væl hóskandi til havnir, virkir, stovnar, skúlar og aðrar bygningar.

Kaj Andreasen & Co
Heilsøla, smásøla og umboð - Tel. 315600 - Fax 318008